Far Shipping fingið fleiri avtalur undir land

Jógvan Hugo Gardar

15.10.2015 - 17:53

Oljan.fo

Norska frálandareiðaríið Far Shipping boðar frá at tey hava fingið avtalur fyri fleiri av teirra skipum. Reiðaríið er eitt av teimum sum hevur merkt kreppuna sum rakar frálandavinnuna nú minni virksemi er.

Esso Australia hevur undirskrivað avtalu um leigu av Far Supplier komandi trý árini.

Woodside Energy hevur longt avtaluna um leigu av Far Sirius í eitt hálvt ár. Skipið hevur nú arbeiði til august í 2016. Hendan avtalan kann leingjast einaferð afturat.

Woodside Energy hevur eisini gjørt avtalu um at leingja leiguavtaluna fyri Lady Grace uppá 240 dagar. Sama fyritøka hevur eisini leiga Far Starling, Far Skimmer og Far Spirit í samband við virksemi í Korea og Myanmar. Hesi skipini hava tí nokk at gera til januar mánaði 2016 er farin.

Petrobas í Brasil hevur sagt upp avtaluna um leigu av Far Strider, ið verður leysur av avtaluni um hálvan november.